# lat is«





*Jón Kragesteen og Rúna Sivertsen frá Ferðslutrygd saman við limum í býarstýrinum í Roskilde, f.v.: Kirsten Bjerager (rad), Rúni Viberg (sos.dem), og Bjørn Dahl (venstre), borgmeistari í Roskilde Kommunu*

menniskjansligum feilum, er tað her at hugsjónin um eina tekniska koyribreyt kemur inn soleiðis at við teoretiskari og praktiskari undirvísing ber til at minka um ferðsluóhappini og økja um ferðslutrygdina.

Sjálvt tann besta trygdarútgerðin er til fánýtis, um bilførarin ikki klárar at hava tamarhald á bilinun í eini neyðstøðu. Ótalligar kanningar vísa, at flestu ferðsluvanlukkurnar hvørki skyldast bilin ella koyribreytina, men evnunum hjá bilføraranum til at reagera rætt og taka ta røttu avgerðina.

Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd sigur, at um vit ikki hava somu umstøður á slíkum koyritekniskum breytum, sum onnur lond, so er vandi fyri, at koyrikort okkara missir virði.

Hvørt ár senda fyritøkur og stovnar nógv fólk uttanlands at venja á royndarbreytum fyri at dagføra koyriførleikan. Hetta kundi eins væl verið gjørt í Føroyum, heldur hann.

Meðan ferðalagið var í Roskilde, var eisini høvi at síggja, hvussu Roskilde kommuna hevur skipað ferðslutrygdina í býnum. Kommunan hevur seinastu árini gjørt nógv fyri at betra um ferðslutrygdina í Roskilde og har um leiðir.

Um kvøldið var døgurði har m.a. umboð fyri Rådet for større Færdselssikkerhed og býarstýrið í Roskilde luttóku saman við borgarstjóranum, Bjørn Dahl. Ein av býráðslimunum var tvørámaðurin Rúni Viberg.



*Kenneth Saust, stjóri hjá Goodyear í Danmark, tappaði luftina úr øllum fýra dekkunum á hesum Ford Mondeo, sum hevði Goddyear "Run on Flat" dekk undir. Síðan fór hann ein túr á teknisku koyrdibreytina við bilinum. "Run on Flat" dekkini kunnu koyra eitt strekki upp á 80 kilometrar við 80 km/t uttan luft. Fremst á myndini Heðin Zachariassen, løgtingsmaður*




*Nógv var at tosa um. Frá vinstru: Finnleif Durhuus, frá Landsverk, Janus Isaksen, frá Bileftirlitinum, og Heini Eysturoy frá Landsverk*

# Ítøkjulig ætlan um koyribreyt





*Hans J. Hermansen og Heini á Borg*

**Hans J. Hermansen og Heini á Borg í Havn bíða eftir svari frá Tórshavnar kommunu um at fáa øki til eina koyritekniska breyt**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Vit bíða bara eftir svari frá Tórshavnar býráð upp á umsókn okkara um eitt øki til eina koyritekniska breyt.

Hetta sigur Hans J. Hermansen, koyrirlærari í Havn, sum saman við Heina á Borg hevur søkt um øki til eina slíka breyt.

– Vit ætla at byrja í smáum, men ætlanin er, at hetta skal verða til eina veruliga koyritekniska breyt, sum lýkur øll tey krøv, ið eru neyðug, sigur Hans J. Hermansen.

Hann vísir á, at í kunngerðini fyri koyrikortið stendur, at krav er um undirvísing á slíkari breyt, tá ein slík breyt er komin.

– Vit skulu eisini minnast til, at koyrikortið hjá okkum er treytað av hesum krøvum, sum eru í okkara grannalondum.

Umframt vanliga koyriundirvísing hava Hans J. Hermansen og Heini á Borg eisini aðrar ætlanir.

– Vit hava gjørt hetta, tí vit hava áhuga fyri hesum. Tað hevur so nógv verið tosað um hetta í nógv ár, men eingin er komin á mál við hesum, sigur Heini á Borg.

– Tí er tað eisini okkara ætlan at fáa motorítróttin við eisini, sigur hann og vísir á skipaðu koyringina við knallertum og motorsúkklum, sum er komin í lag seinnu árini.

Hann nevnir eisini aðrar greinir innan mótorítrótt, sum kunnu gerast aktuellar, tá umstøðurnar eru til tess.

– Alt hetta skal sjálvandi fara fram undir tryggum og skipaðum umstøðum, sigur Heini á Borg, sum vónar, at koyrilærarar o. o. fara at taka væl undir við ætlanini, tí uttan teirra stuðul verður ætlanin ikki til veruleika.

# Viðgera umsókn um koyribreyt

**– Vit hava tvær umsóknir liggjandi um øki til eina koyritekniska breyt, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tórshavnar kommuna hevur tvær umsóknir liggjandi um øki til eina koyritekniska breyt. Umframt umsóknina frá Hans J. Hermansen og Heina á Borg, er eisini ein umsókn frá Koyrilærarafelagnum.

– Ein slík breyt krevur nógv pláss. Vit hava tosað um at leggja av øki til hetta í Húsahaga ella á Glyvursnesi, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn. Hann vísir á, at umsóknirnar eru farnar til ummælis hjá bóndanum og hjá Búnaðarstovuni.

Heðin Mortensen vil ikki siga júst, hvat øki hann heldur er best egnað, tí umsóknirnar ikki eru liðugt viðgjørdar.

– Men kommunan er stór, so sjálvandi hava vit pláss til eina slíka breyt, sigur Heðin Mortensen, sum eisini heldur tað verða eitt gott hugskot, um ein slík breyt eisini kann brúkast til motorítrótt.